

www.oljan.fo

**Jan Müller** 17 - 12 - 2012

# Stórur áhugi fyri oljuleiting í Eysturgrønlandi

Oljufeløg standa í bíðirøð fyri at gerast partur av einum møguligum oljuævintýri í Eysturgrønlandi. Hetta vísir ein fyribils útbjóðing í økinum. Ráevnisfyrisitingin í Nuuk hevur fingið 11 umsóknir um at fáa loyvi at leita eftir og útvinna olju og gass í Grønlandshavinum, nú freistin var úti 15. desember. Hetta sigur grønlendska sjálvstýrið í eini fráboðan. Tær mongu umsóknirnar vísa, at stór kapping er um fleiri av teimum mongu teigunum. Nú verður so mett um umsóknirnar og fara samráðingar fram, áðrenn tær bestu umsóknirnar fáa grønt ljós. Úrslitið av útbjóðingini er ein týðandi varði í royndunum at røkka einum langsiktaðum og burðardyggum samfelagsbúskapi i Grønlandi sigur Ove Karl Bertelsen, limur av landsstýrinum. Økið, sum er boðið út, er 50.000 ferkilometrar stórt. Talan er um 19 teigar, sum eru millum 1752 og 3306 ferkilometrar til støddar. Útbjóðingin er í tveimum. Tann fyrra snýr seg um tann sonevnda Kanumas bólkin, sum fevnir um Statoil, BP, ExxonMobil, Chevron, Japan Oil, Gas and Minerals National Corporation og Nunaoil. Seinna útbjóðingin er ein opin útbjóðing, har øll feløg hava loyvi at søkja.

